# Dómarayvirlit

**Formula-deildin**

| | |
|---|---|
| GÍ – VB/Sumba | Rúni Gaardbo |
| NSÍ – KÍ | Jens P. Brattalíð |
| EB/Streymur – B71 | Eiler Rasmussen |
| AB – Skála | Páll Augustinussen |

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 16 | 11 | - | 3 | - | 2 | 28,1 | 10 | 18,1 | 36 |
| 2 NSÍ | 15 | 10 | - | 2 | - | 3 | 25 | 13 | 12 | 32 |
| 3 EB/S | 15 | 9 | - | 2 | - | 4 | 25 | 16 | 9 | 29 |
| 4 HB | 16 | 7 | - | 3 | - | 6 | 31 | 23 | 8 | 24 |
| 5 GÍ | 15 | 6 | - | 4 | - | 5 | 22 | 29 | -7 | 22 |
| 6 Skála | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 17 | 22,1 | -5,1 | 19 |
| 7 B71 | 15 | 5 | - | 3 | - | 7 | 24 | 26 | -2 | 18 |
| 8 KÍ | 15 | 4 | - | 3 | - | 8 | 23 | 23 | 0 | 15 |
| 9 AB | 15 | 2 | - | 4 | - | 9 | 18 | 29 | -11 | 10 |
| 10 VB/S | 15 | 2 | - | 3 | - | 10 | 12 | 34 | -22 | 9 |

# Síðsta umfar undan su

**Um vikuskiftið vera fýra dystir í Formuladeildini. Serliga spennandi uppgerð verður í Runavík, har NSÍ skal royna at hanga í B36, meðan mótstøðuliðið KÍ skal leggja enn størri sjógv niður til botnliðini**

FORMULADEILDIN
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Vegna framskundaðu uppgerðina millum HB og B36 í farnu viku, sum upprunaliga skuldi vera hetta vikuskiftið, eru tey bæði liðini longu farin í summarsteðg. Hetta er kanska unt teimum væl, tí teimum fyri framman standa nevniliga altjóða dystir í Evropa.

Tað skal EB/Streymur tó eisini, men eftir hetta umfarið fara teir somuleiðis í summarsteðg saman við øllum hinum føroysku liðunum.



## Hálv grannauppgerð

Eftir at undirsjóvartunnilin er komin undir Leirvíksfjørð, eru dystirnir millum NSÍ og KÍ næstan gjørdir til grannauppgerð.

Eftir úrskurðin hjá aganevndini í FSF, sær støðan í oddinum hjá NSÍ nú øðrvísi út. B36 hevur runnið eftir teimum í nøkur umfør, men eftir at B36 fekk tvey stig afturat kontuni vegna úrskurðin hjá FSF, er tað nú NSÍ, sum skal renna eftir B36.

Í kapprenningini skal NSÍ seta síðsta endaspurtin inn áðrenn summarsteðgin. Hetta skulu teir gera ímóti KÍ, sum mikukvøldið tóktist at hava fingið fótin fyri seg aftur. Hetta er uppleggið til ein sera spennandi dyst, sum verður við Løkin sunnudagin kl.15.

Í dystinum móti AB mikukvøldið var talan um sera álopskendan fótbólt hjá KÍ. Tískil kann tað vera sera spennandi at síggja hvussu KÍ fer at royna seg móti NSÍ, sum eisini hevur spælt álopsfótbólt í ár.

## Formurin stendur royndina

Í Gøtu fær GÍ vitjan av VB/Sumba. Undan dystinum móti B36 seinasta vikuskiftið, hevði koyrt sera væl hjá GÍ. Men liðið varð tann dystin so at siga blást av vøllinum, og skulu teir í hesum dystinum tískil royna at fóta sær aftur. Tað skulu teir ímóti einum øðrum liðið, ið eisini skal fáa fótin fyri seg. Nevniliga VB/Sumba.

Her kann sigast, at hvørki av liðunum kann brúka ein javnleik til nakað sum helst. GÍ kann við einum sigri yvirhála HB á fjórða plássi,

# Við – ikki við

**Ikki við:** **Fróði Clementsen (knæskaða)**
**Morten Overgaard ( leikbann)**
**Peter Christiansen (leikbann)**
**Jón Nielsen (burturstaddur)**

**Ikki við:** **Hanus Clementsen (knæskaða)**
**Símin Hansen (leikbann)**
**Magnus Olsen (burturstaddur)**

**Allir tøkir**

**Við aftur:** **Hans Pauli Petersen (eftir leikbann)**
**Ikki við:** **Sámal Joensen (vøddaskaða)**
**Hans Jørgen Djurhuus (knæskaða)**
**Tomasz Sajdak (vøddaskaða)**
**Niclas Niclassen (burturstaddur)**
**Erling Jacobsen (burturstaddur)**
**Ivasamir:** **Poul Ennigarð**